Rættindi hjá brekaðum

Týsdagin 5. oktober verður ein evnisdagur um rættindi hjá brekaðum í Norðurlandahúsinum

EVNISDAGUR
tíðindaskriv

Á evnisdegnum verður ein røð av fyrilestrum og framløgum um støðuna hjá fólki, ið bera brek, sum samfelagsborgarar.

Tiltakið, sum byrjar klokkan 13.00, er alment, og luttøkan er ókeypis, so vónandi seta nógv fólk sær hendan seinnapartin av, fyri at hoyra um, hvørji rættindi og hvørja støðu, fólk við breki hava í Føroyum í dag.

Bjørt Samuelsen, fjølmiðlakvinna, stýrir degnum og tekur samanum. Møguleiki er hjá áhoyrarunum at seta spurningar.

Tað er stýrisbólkurin fyri Ár teirra brekaðu 2003, sum saman við Almanna- og heilsumálaráðnum skipar fyri tiltakinum.

Single-kvøld í Vertshúsinum

SINGLE-KVØLD
tíðindaskriv

Vertshúsið hevur fingið áheitanir um at fyriskipa eitt singul kvøld av og á. Tað eru nógv sum eru singul og tíma ikki at fara einsamøll á Vertshús. Leygarkvøldið 2. oktober verður eitt singulkvøld í Vertshúskjallaranum við hugnatónleiki, kertuljósum, amorøsari drinksmenu og kærleika í luftini. Vertshúsleiðslan vónar at nógvir singlar koma í kjallaranan Leygarkvøldið og hvør veit ? kanska situr "your lifes companion" har ótolin og býðar við tveimum "Kiss Me Quick" cocktailum og østrogenini fara upp á kók.

Avgjøld á sodavatn:

Vinnufíggindaligt fíggjarlógaruppskot

– Sodavatn er ein av teimum fáu vørunum, sum tað ber til at framleiða í Føroyum. Men nýggja fíggjarlógaruppskotið leggur av álvara fót fyri vinnuni, nú teir ætla at leggja avgjøld á sodavatn, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór

Einar Waag, stjóri í Føroya Bjór, skilir ikki hví landsins leiðsla vil leggja fót fyri føroysku vinnuni við ætlaðu avgjøldunum á sodavatni
Savnsmynd

FÍGGJARLÓGIN
Eydna Skaale
Eydna@sosialurin.fo

Føroyska sodavatnið fer at dýrka, um fíggjarlógaruppskotið verður sett í gildi. Bárður Nielsen og hansara menn ætla nevniliga at fáa 35 milliónir inn í landskassan, við at seta avgjøld á tubbak og sodavatn.

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, er alt annað enn nøgdur við hetta uppskotið.

– Eg skilji ikki hví teir skulu leggja fót fyri eini av teimum fáu vinnunum, sum bera seg í hesum landinum. Hetta er 60'ara og 70'ara politikkur, sum vit ræðast, og sum ikki vilja síggja aftur, sigur Einar Waag.

Søtmetið slapp undan

Einar Waag sigur, at eitt av størstu ivamálunum er, hví til dømis søtmetið heilt er sloppið undan nøkrum avgjøldum.

– Vit, sum eru ein partur av føroysku vinnuni, koma at gjalda dýrt fyri hesi avgjøldini. Men allar hesar innfluttu sukurvørurnar koma als ikki at vera merktar av hesum. Tað er veruliga ikki til at skilja, heldur Einar.

Hann sigur, at undanfarna samgonga arbeiddi miðvíst við heilsugóðum málum. Tiltiknu grønu keksirnar, sum skuldu gerast dýrari, tí tær vóru ósunnar, vóru bert eitt dømi. Um undanfarna samgonga hevði komið við einum uppskoti um eisini at leggja avgjald á sodavatn, tí tað er so ósunt, so hevði tað kanska givið meining.

Men Einar skilir ikki, hví núverandi samgonga hevur tikið avgerð um at leggja fót fyri føroyska sodavatnið, ímeðan biligu, útlendsku vørurnar heilt ótarnaðar, framvegis kunnu floyma inn á føroyska marknaðin.

– Vit kunnu taka juice sum dømi. Tað er prógvað, at tað inniheldur bæði sukur og sýru, og at tað tí er minst líka ringt fyri tenninar sum sodavatn er. Vit kunnu taka alla sjokolátuna, sum í dag kostar svarta einki, og sum tey ungu ganga og jagla allan dagin. Tað er so sanniliga heldur ikki sunt. Hví verða avgjøldini ikki løgd har ístaðin, so tey ikki skaða føroysku vinnuna, spyr Einar Waag.

Hann sigur, at hann í gjár, tá hann fekk leysatíðindini um avgjøldini váttað, spurdi Bárð Nielsen, fíggjarmálaráðharra, um hví søtmetið er sloppið undan.

– Hann svaraði mær, at tað visti hann ikki ordiliga. Tá eg so spurdi hann hví sukurfría sodavatnið, sum er tað einasta sodavatnið diabetikarar kunnu drekka, eisini verður líka hart skattað, svaraði hann mær, at tað er ein tolltekniskur spurningur. Men hatta eru reinar undanførslur, og eg haldi ikki at teir hava hugsað seg nóg væl um, staðfestir Einar Waag.

Av tí, at sukurfría sodavatnið eisini fær avgjald, ímeðan søtmetið heilt sleppur undan, heldur Einar, at hesi avgjøldini ikki kunnu umskyldast við heitinum »heilsutollur«.

Hægstu avgjøld í Evropa

Einar Waag sigur, at Føroyar og Danmark hava nógv tað hægsta mvg-gjaldið í Evropa, samstundis sum vit eisini hava nógv tey hægstu avgjøldini á sodavatni.

– Vit liggja á 25% í meirvirðisgjaldi, sum er methøgt í Europa. Nú ætla teir at fáa enn meir inntøkur av vinnuni, og avgjaldið á føroyska sodavatnið fer sostatt at koma upp á 2,40 kr pr. litur. Tá tað er lagt afturat vanliga prísinum, skal mvg og vinningur eisini ománá aftur. So tað verður heilt avgjørt ein príshækking, sum kemur at merkjast, sigur Einar.

Hann sigur, at Danmark, sum eisini hevur eitt sera høgt avgjald á sodavatn, hevur 1,15 kr. Belgia er nr. 3 í Evropa við 50 oyru pr. litur. Føroyingar koma sostatt at rinda 1,25 kr meiri fyri lituríin av sodavatni enn danir og heilar 1,90 kr meiri enn belgiarar. Hetta heldur Einar líkjast ongum.

– Landið fær jú longu 25% av allari sølu, sum er nógv meiri enn hini londini í Europa fáa, so eg haldi tað vera púra burturvið, at teir nú fara inn og taka enn meiri vinning av sodavatninum. Tað verður jú brúkarin, sum skal rinda, og tað er ikki víst, at hann vil tað, sigur Einar, um er sannførdur um, at hetta fer at elva til eina stóra niðurgongd í søluni av føroyskum sodavatni.

– Tað er fullkomiliga ørt, at eingin í føroysku vinnuni kann kenna seg tryggan, fyri nær og hvar landsins leiðsla næstuferð fer at leggja fót. Hetta er púra burturvið, sigur Einar Waag at enda, og leggur eina við, at hann í øllum førum fer at gera sítt til, at uppskotið ikki verður samtykt í verandi líki.

Føroysk list í DK

Færø Expo 2004 eitur framsýningin, ið letur upp leygardagin 2. Oktober á Bredgade 69 í Keypmannahavn.

Listamenninir verða Zacharias Heinesen, Amariel Norðoy, Eyðun av Reyni, Torbjørn Olsen og Kári Sverrisson.

Tryggvi Johansen setur framsýningina.

Skriv frá Bredgade Kunsthandel, har framsýningin skal verða, sigur millum annað soleiðis um teir fimm listamenninar: »... som alle hører til den absolut fremtrædende gruppe af færøske kunstnere, som gennem tiden har formået at samle den færøske billedkunst i en kollektiv, ekspressiv referanceramme...«

Framsýningin verður opin til og við leygardagin 23. oktober. Meiri kann lesast um hvat kunsthandilin hevur at siga um listamenninar á www.bredgade-kunsthandel.dk

–eys–

Amariel Norðoy verður ein av teimum fimm føroyingunum, sum skulu hava framsýning í Keypmannahavn í oktober

Bakka ikki meiri fyri Hans Paula

Tvøroyrar Kommuna ger ikki meiri við leiðaran á frítíðarskúlanum, so má Landsstýrismaðurin heldur stongja hann

Steingir landsstýrismaðurin frítíðarskúlan á Tvøroyri, skal hann vænta sær endurgjaldskrav, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri

ÓSEMJA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tvøroyri: Nú er mangt, sum bendir á, at frítíðarskúlin í Tvøroyri verður stongdur.

Tvøroyrar býráð ætlar sær nevniliga ikki at slaka meiri fyri Landsstýrinum og so má tað standast av í má.

Tað er ósemja um leiðaran á frítíðarskúlanum á Tvøroyri, sum ger seg galdandi.

Tvøroyrar Býráð setti ein lærara í starvið og tað fekk pedagogfelagið at tala at. Felagið sigur, at eftir lógini, skal leiðarin vera pedagogur.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, gav felagnum rætt og álegði Tvøroyrar býráð at broyta starvssetanina.

Býráðið ógildaði so setanina, men setti síðani sama lærara aftur sum fyribils leiðara fyri frítíðarskúlan.

Hetta hevur so aftur fingið landsstýrismannin at seta býráðnum knívin á barkan: Hevur býráðið ikki ógildað setanina og sett ein pedagog í starvið í seinasta lagi í dag, fíggjadagin, verður frítíðarskúlin stongdur.

Gera ikki meir við málið

Men hetta rínur ikki við býráðið á Tvøroyri.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, segði í gjáramorgunin, at býráðið gjørdi ikki meiri við málið.

So ger landsstýrismaðurin tað, sum hann heldur at hann eigur at gera.

Borgarstjórin sigur, at tað stendur ongastaðni í lógartekstinum, at leiðarin skal vera pedagogur.

Tað stendur at hann skal vera námsfrøðingur og tað kann einsvæl verða lærari.

Kristin Michelsen sigur, at stongir Hans Pauli Strøm frítíðarskúlan, fara tey fyra starvsfólkini til húsar.

Eini 20-22 børn í fyrsta flokki hava sína dagligu gongd í frítíðarskúlanum eftir skúlatíð og tey verða sostatt eisini send til hús.

Men býráðið er eisini so mikið sannført í síni sak, at tað hevur gjørt landsstýrismanninum greitt, at stongir hann frítíðarskúlan, kann hann vænta sær endurgjaldskrav frá kommununi.

Politiska barometrið á Tvøroyri hækkar

Á Tvøroyri verður arbeitt við at savna allar flokkarnar á ein einstakan lista til býráðsvalið í næsta mánaði

Tað eru ikki so nógv ár síðani, at ósemjan var so stór á Tvøroyri, at sjálvt javnaðarfólk gingu í tveimum bólkum. Í løtuni eru fýra listar umboðaðir í Býráðnum, men nú verður arbeitt við at savna allar politisku flokkarnar á einum og sama lista til býráðsvalið í næsta mánaði

BÝRÁÐSVAL
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tvøroyri: Politiska barometrið á Tvøroyri hækkar alsamt. Tað hevur altíð leikað ógvuliga hart á ímillum teir ymsu politisku flokkarnar á Tvøroyri og tað eru ikki so mong ár síðani at enntá javnaðarfólk gingu í tveimum bólkum og stillaðu upp til býráðsval á tveimum listum.

Tað stríðsmálið varð síðani lagt afturum og javnaðarfólk kundu aftur savnast á sama lista. Og til hetta býráðsvalið verður enntá arbeitt við at savna allar flokkarnar í Býráðnum á Tvøroyri á einum og sama lista.

Teir ymsu flokkarnir hava tosað saman um hetta og tað er ymiskt, hvussu móttøkan hevur verið.

Summir flokkar taka undir við tí, aðrir hava ikki tikið støðu og uppaftur aðrir eru meiri ivingarsamir.

Men málið er ikki slept og arbeitt verður víðari við tí.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, heldur tað at tað hevði verið tað einasta rætta at savnast um ein felags lista á Tvøroyri.

– Tað eru kommunumál, vit skulu arbeiða við og ikki landsmál og eg haldi, at vit áttu at kunna samst um at ført kommunupolitikk, uttan at blanda partapolitikk upp í, tí partapolitiskar ósemjur hoyra ikki heima í einum kommunustýri, heldur borgarstjórin.

Á seinasta býráðsvali vóru fýra listar: Ein javnaðarlisti, ein sambandslisti, ein uttanflokkalisti og ein samgongulisti við limum úr tjóðveldisflokkinum, fólkaflokkinum og miðflokkinum.

Tað eru sjey býráðslimir á Tvøroyri og tað kunnu í mesta lagi vera 11 valevni á einum lista. Verður talan um ein felagslista, verða tað sostatt í mesta lagi 11 valevni til býráðsvalið á Tvøroyri í næsta mánaði.

Sleppa ikki endanum í Sumba og á Tvøroyri

Sumbingar og tvørafólk fara at tosa víðari um samanlegging, serliga nú landsstýrið ætlar at broyta lógina so at kommunur kunnu leggja saman mitt í einum valskeiði

KOMMUNUSAMANLEGGING
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Sumba/Tvøroyri: Tað er nú greitt, at Sumbiar- og Tvøroyrar Kommuna, leggja ikki saman beint nú.

Í sambandi við kommunuvalið í november, hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum sett eina tíðarfreist fyri, nær kommunur kunnu leggja saman

Tann freistin fór fyrr í vikuni og mikudagin fingu kommunurnar í Sumba og á Tvøroyri boð um, at freistin verður ikki longd.

– Tað kom óvart á okkum, at freistin ikki kundi longjast nakrar dagar. Serliga kom tað óvart á okkum, tí hann var positivur tá ið vit spurdu hann munnliga fyri nøkrum døgum síðani, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Hann ásannar, at tað hevur drigið út, men nú hevdu kommunustýrini sett sær fyri at fingið ferð á ætlaðu samanleggingina og ætlanin var at avgreiða málið uppá einar tvær vikur.

Hann vísir á, at fleiri aðrar samanleggingar eru gjørdar norðanfyri, so leisturin er gjørdur.

Skulu Sumba og Tvøroyri leggja saman, er tað at kalla bara at skifta nøvnini út í teimum sáttmálum, sum eru gjørdir um samanlegging og so kanska gera onkrar dagføringar.

Borgarstjórin sigur,at kommunustýrini í Sumba og á Tvøroyri hava tosað leysliga saman og fyribils hava tey hug at halda fram við arbeiðnum at leggja saman, tó at tað ikki verður beint nú.

Annars hava sumbingar gjørt vart við seg hjá bygdaráðnum í sambandi við ætlaðu samanleggingina við Tvøroyri.

Í eina tíð hava tey savnað inn undirskriftir í Sumbiar kommunu í sambandi við samanleggingina og týskvøldið handaðu tey bygdaráðnum ein lista við 182 undirskriftum.

Tað er gott og væl helvtin av teimum, sum hava vælrætt í kommununi. Á løgtingsvalinum fyrr í ár, høvdu 310 fólk atkvøðurætt í kommununi, 218 fólk í Sumba og 92 fólk í Lopra og á Økrum.

Tey, sum hava skrivað undir, krevja, at borgarafundur verður í Sumba um samanleggingina. Og tey krevja eisini, at verður semja við Tvøroyri um ein sáttmála um samanlegging, skal fólkaatkvøða verða í Sumba, áðrenn bygdaráðið tekur endaliga støðu.